# Økiskvotur og kynskvotur

HERGEIR NIELSEN



Sjey kvinnur sóknast í blaðgrein eftir hugsan míni um kynskvotur í uppskotinum um broytingar í valskipanini.

Økiskvotur verða í hesum viðfeingi settar upp móti kynskvotum. »Vilja tit økiskvotur, so vilja vit kynskvotur,« siga Jenny Kingbo, Katrin Gaard, Eva H. Bennicke, Ann Damgaard, Margit Stórá, Doris Bjarkhamar og Hallbera Fríða West.

Sum skilst, tykist fatanin vera, at kynskvotur eru ein berandi partur av verandi skipan, men einki er meiri burturvið enn tað sama.

Hildið verður, at nýfingna framgongdin í kvinnuumboðan á tingi skyldast nýggju vallógini, og ótti tykist vera fyri, at henda hvørvur aftur, sleppa vit verandi valskipan.

Hesin ótti er ógrundaður og beinleiðis villeiðandi. Eingin ivi er um, at tær kvinnur, ið valdar vóru við seinasta løgtingsval, høvdu verið eins væl valdar undir gomlu valskipanini.

Kvotur, ella fyrimunir, kunnu skipast við lóggávu, men einki sæst til nakað hugskot hesum viðvíkjandi.

Í Noregi, Danmark og Svøríki hava flokkarnir nøkunlunda ræði á, hvørji vald verða á teimum einstøku listunum, og tað høvdu vit eisini í Føroyum fram til 1972.

Tey fáu, sum skipaðu listarnar kring landið, gjørdu tá av, at tann sum tey settu ovast, fekk sessin.

Hesi ódemokratisku kvotuskipan, har nøkur fá gjørdu av, hvørji tey nógvu sluppu at velja, sleptu vit fyri meiri enn einum mansaldri síðan.

Til ber eisini at broyta verandi lóggávu soleiðis, at annarhvør, sum kemur inn, skal vera kvinna, men einki sæst í nøkrum flokki til nakra hugsaða gongd hendan vegin.

Fyrr var tað so, at heitt varð á veljaran um at velja flokkin, men her er mundandi broyting komin í.

Verandi valskipan er sera persónsfikserað, og heilt vanligt er nú at síggja ovurdýrar litríkar fotomontasjur, bera boð um persónlig heldur enn politisk val.

Vit hava í dag eina størri kapping millum valevni enn millum flokkar, og ikki er óvanligt at hoyra fólka siga seg ikki hava ráð til at stilla upp.

Skalt tú hinvegin síggjast aftur í almenna kjakinum, so kostar tað pening.

Lýsingar, faldarar, heimasíður, avís- og portalbannarar, valgreinar, bussreklamur og plakatur úr A4 upp í húsafasadustødd seta ovurstór krøv til teirra, ið halda seg hava ráð til at bera út ein almennan politiskan boðskap fyri privatan kostnað.

Upphæddirnar, tey einstøku brúka, liggja úr 10 upp í fleiri hundraðtúsund krónur, og eru hetta upphæddir, ið tungar eru at avrokna, serliga um eingin inntøka verður vunnin fyri íløguna.

Havandi í huga, at kvinnur í stóran mun hava lægri inntøkur enn menn, skilst, at galdandi valskipan, har ein er móti øllum, og øll móti einum, ikki júst er fremjandi fyri at fáa fólk við lágum inntøkum inn á ting.

Elitan í samfelagnum gerst alt betri umboðað, og herda kappingin hevur við sær, at bæði millum tey uppstillaðu og tey valdu er tað nú ein størri partur, sum hevur langa útbúgving og góða inntøku.

Verandi valskipan hevur ma. tær álvarsomu fylgjur, at kvinnurnar, sum vanliga verða roknaðar sum tann minni múgvandi bólkurin, fara við síðini at vera við skerdan lut.

Síðani verða onnur minni múgvandi við sviðusoð, og endin verður, at tað eru tey ríku, sum koma at sita við tí politiska valdinum.

Eitt týðiligt rák sæst sostatt aftur í, at tað er tað óuppplýsta peningavaldið, sum fær ræði á samfelagnum, og tað er ein ódámlig gongd hjá okkum, ið royna at verja tann minni menta og eina so munagóða kvinnuumboðan á tingi, sum gjørligt er.

Fyri tíggju árum síðan fingu finnlendingar lóg um, at tey uppstillaðu skuldu kunnað um, hvussu tey fíggjaðu valstríð sítt, so at innlit fekst í skuldsetingarnar um, at tey valdu fóru at renna privat ørindi fyri tey, ið fíggjaðu valstríðið hjá politikarunum.

Tær sjey kvinnurnar vilja vera við, at broyta vit valskipanina aftur, so løggeva vit kvinnurnar út aftur úr Løgtingum.

Einki prógv er fyri hesum, tvørturímóti. Lata vit hinvegin standa til, so sæst einki nýtt, hvørki kvinnu- ella mansandlit, aftur á tingi úr ytru pørtunum av landinum.

Tingið fer sum frá líður at verða mannað av fólki, sum búgva har atkvøðurnar eru, har miðlarnir virkað, har tær flestu og størstu inntøkurnar eru, og har tað óupplýsta peningavaldið hevur tær rúmastu ræsirnar at virka á.

Tástani er fólkaræði farið fyri bakka, og tað kann ganga væl skjótari enn nakar gevur sær far um.

Flestu av omanfyri nevndu niðurstøðum komu fram í fyrilestri fyriskipaðum av Demokratia á Parnassinum í 2007, og eg kann ikki annað enn siga meg fullsamdan í tí, har kom fram.

# Kommunureformur uttan um kommunupolitisku skipanina

HEÐIN MORTENSEN
formaður, Kommunusamskipan Føroya



Sum fuglurin Fønix reistist landsstýriskvinnan í kommunumálum seg upp úr øskuni frá Gjáarfundinum við tí greiða boðskapi, at hon nú ætlar at seta eina nevnd við landspolitikarum at fremja fráboðaða kommunureformin.

Tað er sjálvsagt at frøast um, at eitt sindur av veiggi er í onkrum parti av landsstýrinum, og at tað enn eru landsstýrisfólk, ið vísa virkishuga og hugsa visjonert og frameftir.

Men lat tað vera sagt beinanvegin, at vit, sum varða av kommununum, fara á ongan hátt at finna okkum í ikki at vera ein sjálvsagdur partur av politisku tilgongdini allan vegin.

**Kommunuálitið nýggja**
Í januar 2009 setti landsstýriskvinnan í kommunumálum niður eina nevnd við embætisfólkum og serfrøðingum at gera uppskot til nýggjan kommunubygnað og at umskipa kommunugeiran. Kommunusamskipan Føroya hevði í áravís eftirlýst júst hesum, og tí var tað eitt gott stig at fáa tikið samanum og gjøgnumført tær ætlanir, sum alt ov leingi hava ligið í óvissu millum land og kommunur, og tí bert hevur darvað framburði á kommunupolitiska økinum.

Kommunufeløgini høvdu embætisumboð í nevndini, sum hóast trongan arbeiðssetning og tíðarfreist í oktober 2009 lat úr hondum eitt gott grundarlag at taka politisku avgerðirnar, sum skulu takast bæði landspolitiskt og kommunupolitiskt, um komast skal víðari.

Og kommunurnar í Kommunusamskipanini hava síðani viðgjørt álitið við góðum huga. Komandi fríggjadag fara allir kommunustýrislimir í Kommunusamskipanini á fund í Klaksvík at gera sínar niðurstøður um álitið og ein felags boðskap, soleiðis at klárt er at fara undir ítøkiliga politiska viðgerð saman við landsmyndugleikunum.

**Kommunupolitiska skipanin útihýst**
Tað var tí alt annað enn hugaligt at hoyra landsstýriskvinnuna í tíðindunum fríggjadagin boða frá, at nú fara tey til verka – umboð fyri politisku flokkarnar á tingi saman við landsstýrinum – at gera nýggjan kommunubygnað, nýtt ábyrgdarbýti millum land og kommunur umframt nýggjan fíggingarleist, sum skal verða liðugt í januar 2011.

Ikki so sjáldan verður man paff av tíðindum úr landsstýrinum, men fríggjadagin bar av.

Tað er sjálvandi jaligt at hoyra, at landsstýrið nú er sinnað at fremja veruligan kommunupolitikk við ítøkiligum ætlanum. Tí hava vit bíðað eftir leingi. Men líka so hugstoytt og ørkymlandi er tað, at landsstýrið nú ætlar at gera hetta uttan at kommunupolitikarar, sum eru fólkavald at taka sær av kommunum, verða nevnd við einum orði og tí ikki ætlast tikin við í tilgongdina yvirhøvur.

Hetta gongur greitt ímóti øllum tilráðingunum í kommunuálitinum um umskipanartilgongdina, har serligur dentur júst verður lagdur á javnbjóðis viðgerð og samskifti millum land og kommunur – bæði fólkaræðisliga, politiskt og fyrisitingarliga. Hetta gongur eisini greitt ímóti øllum líknandi tilgongdum í grannalondum okkara.

Vónandi var hetta bert ein gloymska hjá landsstýriskvinnuni – ein gloymska av tí slagi, sum er so sjálvsagt, at ikki er neyðugt at nevna tað. Men boðskapurin hjá landsstýriskvinnuni var so mikið greiður og helst eisini beinleiðis úrslit av gjáarseminari landsstýrisins, at vit ivast stórliga.

**Reformurin umfatandi samfelagsbroyting**
At gera so umfatandi broytingar í stórum parti av demokratisku samfelagsskipan okkara, sum kommunurnar jú eru, uttan at kommunupolitikarar eru við í allari tilgongdini, hevði verið sum at broyta stýrisskipanarlógina uttan at løgting ella landsstýrið vóru við í tilgongdini.

Hetta er púra óhoyrt og dømt til at miseydnast.

Talan er um bygnaðarbroytingar, sum í stóran mun koma at avgera, hvat slag av lokalum fólkaræði vit frameftir skulu hava, og hvussu tað skal virka.

Spurningurin um, hvussu nógvar kommunur vit skulu hava, hvørjar hesar skulu vera, hvørji málsøki tær skulu hava ræðið á, og hvussu hetta skal fíggjast, gevur bara lokalpolitiska meining, um vit frammanundan hava gjørt av, hvussu málsøkini verða løgd kommununum – eitt nú hvussu stórt lokala rásarúmið skal vera at raðfesta og tillaga tænasturnar til lokala tørvin.

Hetta kemur tí ikki bara at ávirka tað, sum kemur, men sanniliga eisini tað, sum er – tí um kommunurnar skulu lyfta fleiri og størri uppgávur, kemur tað eisini at ávirka møguleikan at lyfta tær uppgávur, ið longu eru hjá kommununum.

**Lands- og kommunupolitisk semja neyðug**
Landsstýriskvinnan segði í tíðindasendingini leygarmorgunin, at kommunurnar eftir samanlegging ikki skulu stýrast sentralt av landinum. Hetta hongur bara so ómetaliga illa saman við, at tað samstundis bert eru politisku flokkarnir á tingi og landsstýrið, sum áðrenn árslok skulu avgera, hvussu kommunubygnaðurin og geirin annars skal skipast.

Hvussu meira sentralpolitisk stýring kann tað blíva?

Um tað er tí, at landsstýriskvinnan trýr so lítið uppá, at til ber at finna semju millum politisku flokkarnar, so er loysnin ikki at steingja seg inni uttan samband við veruleikan. Loysnin er heldur at finna semjur, sum eru væl grundfestar í tí, sum tær snúgva seg um, og sum ikki støkka sundur, tá tær møta veruleikanum.

Kommunurnar eru ikki brúkarar av kommunuskipanini, kommunurnar eru kommunuskipanin. Kommunurnar í Kommunusamskipanini góðtaka tí undir ongum umstøðum at vera útihýstar í allari teirri týdningarmiklu politisku tilgongdini at broyta kommunubygnaðin og innihaldið í honum.

Vit vænta tí eina rættleiðing frá landsstýriskvinnuni. Vit vænta og krevja eisini fundarboð frá landsstýriskvinnuni, so at nevndin, hon nú ætlar at seta, eisini hevur kommunupolitisk umboð á jøvnum føti við landspolitisku umboðini.

Lat ongan iva verða um, at kommunurnar í Kommunusamskipanini eru klárar at fara til verka.

*Tórshavn, 22. februar 2010*

